# P/F Føroya Lívstrygging

Skrás.nr. 2964

## Ársfrásøgn fyri 2011

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um felagið ........ 2

Yvirlit yvir samtakið ........ 3

Leiðslufrágreiðing ........ 4-10

Leiðsluátekning ........ 11

Átekning frá óheftum grannskoðarum ........ 12-13

Nýttur roknskaparháttur ........ 14-18

Rakstrarroknskapur ........ 19

Fíggjarstøða ........ 20-21

Frágreiðing um eginogn ........ 22

Notur ........ 23-34

Seinastu 5 árini (samtak) ........ 35

Seinastu 5 árini (móðurfelag) ........ 36

**FELAGIÐ**

P/F Føroya Lívstrygging
Kopargøta 1
Postsmoga 206
FO-100 Tórshavn
Skrásetingarnr. 2964
Heimstaður: Tórshavnar kommuna
11. roknskaparár

**NEVND**

Finn Danberg, nevndarformaður
Gunnleyg Árnafjall, næstformaður
Kári Petersen
Jógvan Mørkøre
Gunnleivur Dalsgarð

**STJÓRN**

Poul Christoffur Thomassen, stjóri

**AKTUARUR**

Jan Buschardt, cand. act., góðkendur aktuarur

**TRYGGINGARLÆKNI**

Høgni Debes Joensen, landslækni

**GRANNSKOÐAN**

NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F
P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*, løggilt grannskoðaravirki

Tryggingar- og eftirlønarvirksemið hjá samtakinum er býtt sundur í tvey ymisk feløg. P/F Føroya Lívstrygging (Lív1) er móðurfelag í samtakinum og umsitur tær tryggingar, ið eru teknaðar fram til 1. januar 2000, og sum hava landskassaveðhald. Tryggingar teknaðar frá 1. januar 2000 eru lagdar í P/F Tryggingarfelagið Lív (Lív2), sum er dótturfelag hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Harumframt eru trý onnur feløg í samtakinum, sum taka sær av leiguvirksemi umframt framtaksvirksemi.

Á talvuni niðanfyri er bygnaðurin hjá LÍV-samtakinum lýstur (assosierað feløg ikki tikin við).



**HØVUÐSVIRKSEMI**

LÍV er Føroya største veitari av lívstryggingar- og eftirlønarskipanum til Føroyska arbeiðsmarknaðin.

Ársúrslitið hjá samtakinum í 2011 gjørdist eitt hall á 316 mió. kr. eftir skatt. Hallið kemst serliga av, at lívstryggingaravsetingar eru hækkaðar vegna lækkandi rentu á fíggjarmarknaðinum. Tað er vert at leggja til merkis, at P/F Føroya Lívstrygging ikki longur stovnar nýggjar tryggingar, men umsitur tryggingar, sum eru stovnaðar áðrenn 2000. Dótturfelagið, P/F Tryggingarfelagið Lív, stovnar nýggjar tryggingar, og hetta felagið hevur eitt avlop á 6,6 mió. kr.

Tryggingartakararnir í P/F Føroya Lívstrygging og P/F Tryggingarfelagnum LÍV hava ikki fingið tillutað bonus í 2011.

**ÁRIÐ 2011 – GONGDIN Í VIRKSEMI OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM HJÁ SAMTAKINUM**

**Tryggingarvirksemi**

Tryggingargjøldini hjá samtakinum eru økt við 19 mió. kr. í 2011. Í 2011 vóru tryggingargjøldini slakar 363 mió. kr. móti sløkum 344 mió. kr. í 2010. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 5,2 % móti einum falli uppá 1,1% í 2010.

Tryggingargjøldini hjá móðurfelagnum eru fallandi og eru í 2011 fallin úr 99 mió. kr. í 2010 til 95 mió. kr. Býtið millum móðurfelagið (Lív1) og dótturfelagið (Lív2) er lýst í talvuni niðanfyri.




Við árslok 2010 vóru 20.367 persónar fevndir av eftirlønar- og lívstryggingum hjá LÍV-samtakinum, og við ársenda 2011 20.017 persónar.

Hetta kann útgreinast soleiðis:

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Lív 1 | 6.077 | 6.924 |
| Lív 2 | 13.940 | 13.443 |
| | 20.017 | 20.367 |

Tryggingarveitingarnar kunnu býtast millum útgjaldingar í sambandi við eftirlønaraldur, útgjøld í sambandi við deyða og óarbeiðsføri harumframt afturkeyp av tryggingum. Váðin við deyða og óarbeiðsføri verður endurtryggjaður. Skaðagongdin hevur verið góð tey seinastu árini, og tí verður givin avsláttur av tryggingargjaldinum uppá 25 % við óarbeiðsføri og 30 % við deyða.

Tryggingarveitingarnar hjá samtakinum eru falnar úr 190 mió. kr. í 2010 til 183 mió. kr. í 2011. Fallið svarar til 4,7%. Tryggingarveitingarnar hjá móðurfelagnum eru øktar úr 94 mió. kr. í 2010 til 97 mió. kr. í 2011.

Lívstryggingaravsetingarnar verða gjørdar upp til marknaðarvirðið við støði í einari rentukurvu, sum danska Fíggjareftirlitið hevur ásett, og sum Tryggingareftirlitið fyriskrivar at nýta. Í oktober var uppgerðarhátturin fyri rentukurvina broyttur, og hetta merkir at lívstryggingaravsetingarnar minkaðu.

Hóast hetta fullu uppgerðarrenturnar nógv í 2011, og avleiðingin var, at lívstryggingaravsetingar vuksu munandi.

Broytingin í lívstryggingaravsetingum hjá samtakinum øktist úr 323. mió. kr. í 2010 til 701 mió. kr. í 2011. Hjá móðurfelagnum øktist avsetingin í árinum frá 185 mió. kr. í 2010 til 457 mió. kr. í 2011. Høvuðsorsøkin til broytingina er lækkaða uppgerðarrentan. Størsti parturin av broytingini er í móðurfelagnum, sum hevur eina uppgerðarrentu uppá 4,5 % og er tí serstakliga ávirkað av tí lága rentustøðinum, sum hevur við sær, at avsetingarnar eru øktar munandi.

Rakstrarútreiðslurnar í sambandi við tryggingar-virksemið eru nógv øktar í mun til árið fyri. Felagið hevur arbeitt við at menna nýggja KT skipan, men hetta arbeiðið er fyribils steðgað og skipanin niðurskrivað til 0.

**Fíggjarvirksemi**

Íløguavkastið hjá samtakinum áðrenn rentuavdekning í 2011 var 2,5%.

Tryggingarfelagið Lív hevði eitt fíggjaravkast á 3,3 %. Felagið tryggjar rentuváðan, og í árinum hevði hetta eina positiva ávirkan á íløguavkastið við 7,1%. Samlaða íløguavkastið aftaná fyrisitingarkostnað var 10,2%.

Harafturímóti hevði móðurfelagið eitt fíggjaravkast á 4,0 %.

Gongdin á fíggjarmarknaðinum í árinum hevur verið merkt av stórum rembingum. Partabrøvini fullu nógv, serliga í august, men hækkaðu síðani nakað. Meginpartin av árinum hevur rentan verið fallandi, og tað hevur havt við sær kursvinning á lánsbrøvum.

Partabrøvini hjá samtakinum góvu í 2011 eitt miðalavkast uppá -4,6 %, meðan lánsbrøvini góvu eitt miðalavkast uppá 7,5 %.

Úrslitið av íløguvirkseminum í 2011 var ein vinningur uppá 174 mió. kr. móti 208 mió. kr. í 2010.

Meginparturin av íløgunum hjá samtakinum verða gjørdar í lánsbrøv og partabrøv. Við árslok 2011 vóru 68 % av íløgunum gjørdar í lánsbrøv, og 7 % av íløgunum vóru í partabrøvum.

Íløgupolitikkurin hjá samtakinum leggur dent á at spjaða íløgurnar, soleiðis at samtakið ikki verður so hart rakt, um ein íløguflokkur ikki gevur nøktandi avkast.

Umframt at gera íløgur í lánsbrøv og partabrøv hevur felagið í høvuðsheitum veitt lán til kommunur og gjørt íløgur í fastogn.

Gongdin seinastu 5 árini er lýst í talvuni niðanfyri.




Íløguætlanin í samtakinum hevur verið skipað soleiðis, at P/F Tryggingarfelagið LÍV keypir fíggjarligar trygdir (avdekningar) fyri rentu- og kursváðan. Í 2004 varð avtalað fyri P/F Føroya Lívstrygging við landsmyndugleikarnar og Tryggingareftirlitið, at tær tryggingar, sum vóru teknaðar við landskassaveðhaldi, ikki høvdu tørv á hesum trygdum, tí at landskassaveðhaldið kundi javnmetast við eina fíggjarliga trygd.

*Landskassaveðhaldið*

Sambært kravi í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir hevur felagið síðan 2008 innroknað landskassaveðhaldið í roknskapin. Í ár er henda kunngerð broytt, so at javning av landskassaveðhaldi ikki longur verður førd yvir raksturin. Fyri roknskapin fyri 2011 merkir hetta, at virðisjavningin av landskassaveðhaldinum ikki er førd yvir raksturin, sum vísir eitt munandi hall. Hevði gamli roknskaparhátturin verið nýttur, hevði úrslitið ikki verið eitt hall. Víst verður til umrøðu av hesum undir "Nýttum roknskaparhátti". Somuleiðis verður víst til umrøðu seinni í leiðslufrágreiðingini undir "Serstøk viðurskifti".

*Fíggjarognir og avkast*

Býtið av íløguognum hjá samtakinum er lýst á myndini niðanfyri.




Í talvuni niðanfyri er lýst, hvussu avkastið hevur verið av teimum einstøku ognarflokkunum hjá samtakinum og hjá dótturfeløgunum.

| | Avkast % | Avkast % | Avkast % |
|---|---|---|---|
| | Samtak | Móðurf. | Trygg. Lív |
| Kapitalpartar í dótturfeløgum | - | -20,9% | - |
| Kapitalpartar í ass. feløgum | 0,1% | 0,2% | 0,4% |
| Íløgubygningar | -9,6% | - | - |
| Aðrir kapitalpartar | -4,6% | 10,4% | -29,9% |
| Lánsbrøv | 7,5% | 7,1% | 8,2% |
| Íløguprógv | | 7,9% | -0,5% |
| Útlán | 5,7% | 5,6% | 4,1% |
| Innlán v.m. | 2,6% | 4,6% | 0,4% |
| Avkast áðrenn avdekning | 2,6% | 4,6% | 3,3% |
| Rentuavdekningur | 2,6% | 0,0% | 7,1% |
| Fyrisitingarkostnaður | -0,3% | -0,2% | -0,2% |
| Tilsamans | 4,8% | 4,0% | 10,2% |

## Tryggingarfelagið Lív

Við gildi frá 1. januar 2009 hevur LÍV umskipað sítt virksemi soleiðis, at tryggingar uttan landskassaveðhald – t.e. tryggingar, ið eru teknaðar 1. januar 2000 ella seinni – eru lagdar í dótturfelagið, P/F Tryggingarfelagið Lív.

Høvuðstølini úr ársfrásøgnini eru hesi (t.kr.):

| **Høvuðstøl fyri P/F Tryggingarfelagið Lív** | |
|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | |
| Tryggingargjøld | 260.315 |
| Útgoldnar veitingar | -86.070 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 120.086 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -23.994 |
| Úrslit av endurtrygging | -2.677 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 20.503 |
| Ársúrslit | 8.107 |
| | |
| **Fíggjarstøða** | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 1.292.321 |
| Eginogn tilsamans | 66.175 |
| Aktiv tilsamans | 1.372.726 |

Tryggingarfelagið Lív hevði við árslok 2011 eitt grundarfæfeingið, sum var 38,4 mió. kr. minni enn kravt. Síðani hevur felagið gjørt avtalur við tryggingartakarar um at broyta tryggingaravtalurnar frá miðal- til marknaðarrentu. Við hesum væntar leiðslan, at felagið aftur kemur undir krøvini til fæfeingi í tryggingarlógini.

## Íløgufelagið Royndin

Í 2005 stovnaði LÍV íløgufelagið P/F Royndina. Felagið er eitt framtaksfelag, ið hevur til endamáls at gera íløgur í føroyskar fyritøkur. Tann samlaða íløgan í felagið er 50 mió. kr.

Royndin hevur sum framtaksfelag gjørt íløgu í nógv føroysk feløg. Í 2011 hevur Royndin gjørt íløgu í trý feløg. Meginparturin av íløgunum er gjørd í feløg, ið leggja dent á hátøkni og nýbrot. Framtakskapitalur er váðafúsur kapitalur, og væntast kann tí, at avkastið sveiggjar munandi ár til ár.

Høvuðstølini úr ársfrásøgnini eru hesi (t.kr.):

| **Høvuðstøl fyri P/F Royndina** | |
|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | |
| Ársúrslit | -8.034 |
| **Fíggjarstøða** | |
| Eginogn tilsamans | 43.309 |
| Aktiv tilsamans | 43.309 |

## Lutaíbúðarvirkið

Í 2010 stovnaði LÍV partafelagið Lutaíbúðarvirkið. Felagið hevur til endamáls at gera íløgur í lutaíbúðir og aðrar íbúðir, men enn er felagið ikki byrjað sítt virksemi.

Høvuðstølini úr ársfrásøgnini eru hesi (t.kr.):

| **Høvuðstøl fyri P/F Lutaíbúðarvirkið** | |
|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | |
| Ársúrslit | 43 |
| **Fíggjarstøða** | |
| Eginogn tilsamans | 10.001 |
| Aktiv tilsamans | 10.018 |

## P/F Fastogn

Í 2007 keypti LÍV 50 % av partabrøvunum í P/F Fastogn, sum hevur til endamáls at gera íløgur í og reka fastognir.

Í 2010 hevur LÍV í partaeigarasáttmála tryggjað sær avgerandi ávirkan á felagið, sum við hesum gjørdist dótturfelag hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Høvuðstølini úr ársfrásøgnini fyri 2011 eru hesi (t.kr.):

| Høvuðstøl fyri P/F Fastogn | |
|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | |
| Nettosøla | 27.255 |
| EBIDTA | 22.529 |
| Ársúrslit | -39.282 |
| | |
| **Fíggjarstøða** | |
| Eginogn tilsamans | 171.563 |
| Aktiv tilsamans | 445.136 |

Felagið hevði eitt vánaligt ár, sum í høvuðsheitum stavar frá, at íløgubygningarnir eru niðurskrivaðir við 50 mió. kr.

### Fæfeingisstøða hjá móðurfelagnum

Sum greitt er frá aðrastaðni í ársfrásøgnini, hevur P/F Føroya Lívstrygging innroknað landskassans veðhald til tess at lúka lógarásettu krøvini til grundarfæfeingi. Atvoldin til hetta er í høvuðsheitum, at tryggingarligu avsetingarnar eru gjørdar upp til marknaðarrentu.

Um allir tryggingartakarar skuldu ynskt at fingið sínar tryggingar útgoldnar 31. desember 2011, er tað tað retrospektiva virðið á tryggingarligu avsetingunum (uppgerð til grundarlagsrentu), sum er avgerandi. P/F Føroya Lívstrygging hevur 31. desember 2011 nóg mikið av aktivum til at rinda øllum sítt í slíkum føri. Hetta er lýst í talvuni niðanfyri (t.kr.).

| | |
|---|---|
| **Aktiv:** | |
| Lætt umsetilig (moneter) aktiv | 2.149.815 |
| Onnur aktiv | 1.223.617 |
| Tilsamans | 3.373.432 |
| | |
| **Passiv:** | |
| Tryggingart. avsetingar (retrospektivt) | 2.042.051 |
| Onnur passiv | 1.331.382 |
| Tilsamans | 3.373.432 |

### Kapitalstyrki

Við ársenda 2011 er kapitalstyrkin hjá samtakinum henda (t.kr.):

| t.DKK | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Eginogn | 722.730 | 89.304 |
| Kundaogn | 68.837 | 151.893 |
| Immateriell aktiv | -6.930 | -45.172 |
| Útsett skattaogn | 0 | -2.091 |
| Grundarfæfeingi | 784.637 | 193.934 |
| Fæfeingiskrav | 715.800 | 130.605 |
| Grundarfæfeingi til avlops | 68.837 | 63.329 |
| Kollektivt bonuspotentiali | 73.500 | 68.418 |
| Kapitalstyrki | 142.337 | 131.747 |

### Úrslit og býti av hesum

Móðurfelagið hevur havt kundaogn, sum hevur luttikið í býti av úrslitinum, men henda er øll útgoldin sum bonus í 2011. Tí fer alt úrslitið til eginognina.

## VÁÐASTÝRING

Samtakið er ávirkað av fleiri váðum. Hesir vágar eru í høvuðsheitum fíggjarligir, tryggingarligir, operationellir og handilsligir. Nevndin ger karmar fyri stýring av váðunum í samtakinum, meðan stjórnin hevur ábyrgdina av, at karmarnir verða hildnir.

### Fíggjarligir váðar

Marknaðarváðin er váðin fyri, at virðið á aktivunum ella skyldunum hjá samtakinum broytist vegna rentu- og kursbroyting v.m. Gjaldførisváðin er vandin fyri tapi, ið stendst av tørvinum á gjaldføri innan stutta tíðarfreist fyri at halda gjaldskyldur felagsins. Mótpartsváðin er váðin fyri tapi orsakað av, at mótpartar ikki halda sínar skyldur.

Vantandi spjaðing kann hava tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri LÍV er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv saman við trygd fyri rentuváða. Somuleiðis eru íløgurnar í partabrøv varisligar.

Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti. Samtakið ger m.a. hvønn ársfjórðing stresstestir av váðanum, harundir tær sonevndu "trafikkljóstestirnar", har ognir og skyldur verða váðamettar.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í lættumsetiligum, skrásettum virðisbrøvum. Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein stórur partur av íløguognunum eru settar í stats- og realkredittlánsbrøv. Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur við sama útgevara.

**Tryggingarligir váðar**

Tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamnistíttleika, hættisligari sjúku v.m. Eitt nú økir hækkandi livialdur veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið á andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av hesum er mest týðandi váðin livialdur.

Spjaðingarváði í sambandi við tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi vegna ov stórar einstakar kundabólkar og einstakar tryggingar.

Samtakið hevur avmarkað tryggingarligu váðarnar við at spjaða tryggingarmongdina millum nógvar ymiskar kundabólkar, fakfeløg v.m. og við endurtrygging.

**Operationellir váðar**

Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligar ósemjur, ikki nøktandi ella skeivar mannagongdir ella svik. Samtakið avmarkar operationellan váða við funktiónsskilnaði og innaneftirliti, sum støðugt verður endurskoðað og dagført.

**Handilsligir váðar**

Handilsligir váðar fevna um strategiskar váðar, váðar í samband við umdømi og aðrar váðar við tilknýti til uttanhýsis ávirkanir. Samtakið fylgir neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustig eru á kappingarførum stigi. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við viðskiftafólk.

**Fíggjarlig ávirkan av váðum**

Í notu 25 er ein lýsing av, hvussu felagið og samtakið fíggjarliga kann verða rakt av nøkrum ávísum váðum, sum verða mettir at vera viðkomandi fyri felagið og fyri samtakið.

**VITANARSTIG**

LÍV-samtakið leggur stóran dent á, at starvsfólkini eru á høgum fakligum stigi, soleiðis at viðskiftafólk fáa góða ráðgeving. Starvsfólkini hava í stóran mun tryggingarliga ella fíggjarliga útbúgving. Afturat hesum fáa starvsfólkini støðugt hóskandi eftirútbúgving á sínum virkisøki.

**MENNING**

Samtakið arbeiðir framhaldandi við at menna útboðið til viðskiftafólkini. Í næstum verður m.a. møguligt at tekna tryggingar til marknaðarrentu. Slík menning er nær knýtt at KT-skipanum, sum felagið støðugt mennir í samstarvi við uttanhýsis veitarar.

**ETISK FYRILIT**

Íløguvirksemið hjá LÍV verður skipað soleiðis, at málið um hægst møguligt avkast verður rokkið, samstundis sum fyrilit verður havt fyri, at íløgurnar eru etiskt og sosialt ráðiligar.

Tann størsti parturin av íløgunum hjá LÍV verður umsitin av íløguróktarum uttan fyri samtakið. Í avtalum við íløguróktararnar verður skrivað, at dentur áhaldandi skal leggjast á at halda grundleggjandi mannarættindi.

Høvuðsmálið er, at ILO-sáttmálin verður hildin um ikki at misnýta barnaarbeiði, ikki at gera nýtslu av tvingsilsarbeiði, ikki at gera mismun millum kyn á arbeiðsplássinum og at virða felagafrælsið.

Á heimasíðu felagsins (www.liv.fo) er listi til skjals, sum vísir, hvørjum feløgum LÍV hevði íløgur í við seinasta árslok.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**

23. desember 2011 samtykti Løgtingi broytingar til skatting av pensjónum. Hetta hevur við sær, at pensjónir, ið arbeiðsgevari rindar, verða skattaðar við 40 %, og bert 60% verða inngoldin. Hetta merkir, at inngjøldini fyri hesar tryggingar falla við 40%, eins og fæfeingiskravið fellur av hesi orsøk. Samlagstryggingar verða ikki merktar av lógarbroytingini.

Tryggingarfelagið Lív hevur í samráð við fakfeløgini, ið umboða meginpartin av tryggingartakarunum, valt at leggja um frá miðalrentu til marknaðarrentu. Marknaðarrentuskipanin gevur felagnum betri møguleikar fyri at hava eina íløgustrategi, ið betri sampakkar við tær skyldur, felagið hevur mótvegis kundunum.

Miðalrentuskipanin setur munandi størri krøv til fæfeingi, og hetta avmarkar hóskandi íløgumøguleikar. Umleggingin til marknaðarrentu viðførir, at fæfeingiskravið er fallið munandi, og at Tryggingarfelagið Lív eftir árslok 2011 hevur eitt grundarfæfeingið, ið er størri enn fæfeingiskravið. Hetta er hetta galdandi, nú uppgerðin fyri 1. ársfjórðing 2012 fyriliggur.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki annað hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**SERSTØK VIÐURSKIFTI**

**Landskassaveðhaldið**

Sum greitt frá undir "Nýttum roknskaparhátti" er roknskaparkunngerðin broytt við virknað frá 2011 soleiðis, at virðisjavnan av landskassaveðhaldi ikki longur skal førast yvir raksturin, men skal bókast beinleiðis á eginognina. Víst verður til hesa umrøðu.

Roknskapurin fyri 2011 er nógv merktur av, at innroknaða virðið á landskassaveðhaldinum við árslok 2011 er serstakliga stórt. Hetta skyldast í høvuðsheitum, at samtakið í 2011 fór undir at nýta nýggjar reglur fyri individuellan solvens. Tá felagið er fevnt av landskassaveðhaldi, merkir hetta, at tær nýggju solvensreglurnar økja um støddina av veðhaldinum. Landskassaveðhaldið er roknskaparliga gjørt upp til góðar 1.213 mió. kr. við árslok.

Hetta merkir, at bæði aktiv og eginogn eru økt við nevndu upphædd.

Fyri landskassan er váðin ikki øktur, og tískil merkir stóri vøksturin í virðisásetingini ikki nakran øktan váða, men heldur ein broyttan uppgerðarhátt. Økingin í landskassaveðhaldinum kemur av

- Broyttum reglum fyri uppgerð av landskassaveðhaldi
- Nýggjum solvensreglum, sum økja um kravið til støddina av eginognini
- Tí lága rentustøðinum við ársenda 2011.

Sum lýst undir "Fæfeingisstøða hjá móðurfelagnum" frammanfyri, hevur felagið nóg mikið av aktivum at rinda tryggingartakarunum sínar uppspardu eftirlønir 31. desember 2011.

Landskassaveðhaldið kann býtast upp í tveir partar. Ein partur av landskassaveðhaldinum (530 mió. kr.) er til at rinda tryggingarligar skyldur, sum standast av, at hesar verða gjørdar upp til marknaðarrentu og ikki til grundarlagsrentu.

Hinar umleið 680 mió. kr. eru settar av til at økja um eginognina hjá felagnum vegna nýggju solvensreglurnar, soleiðis at eginognin kann taka teir "stoytir", sum í ringasta føri kunnu raka felagið sambært felagsins metingum og útrokningum. Tað eru tær 530 mió. kr., sum skulu sammetast við støddina av veðhaldinum seinastu árini. Hinar umleið 680 mió. kr. eru til eginognina, sum er bundin, og er tí ikki ein váði fyri landið.

**ÚTLIT FYRI 2012**

**Tryggingarvirksemi**

Fyri 2011 varð væntað, at vøksturin í tryggingargjøldum fór at vera á leið tann sami sum árið frammanundan. Tað vísti seg tó, at tryggingargjøldini fullu eitt sindur í árinum, og er orsøkin til hetta økta kappingin, og at búskaparliga gongdin hevur verið verri enn mett. Eisini varð tann nýggja pensjónsnýskipanin enn einaferð útsett.

Tryggingarmarknaðurin verður í 2012 væntandi merktur av, at nýggj skipan fyri skatting av pensjónum er sett í gildi 1. januar 2012. Væntast kann tí, at tryggingargjøldini koma at falla í 2012.

Tryggingarveitingar og umsitingarkostnaðir verða helst á sama støði sum í 2011, tá sæð verður burtur frá stórum eingangs útreiðslum.

**Fíggjarvirksemi**

Fyri árið 2011 varð væntað, at partabrøvini fóru at geva eitt rímiligt avkast, men hetta vísti seg ikki at halda.

Tann stóri kursvøksturin á partabrøvum, sum hevur verið seinastu tvey árini, kemur neyvan at halda fram, men mett verður, at møguleikar eru fyri einum rímiligum avkasti av partabrøvum í 2012.

Fyri lánsbrøv varð væntað eitt lítið avkast, men vegna fallandi rentur og hækkandi kursir gav árið eitt gott avkast.

Óvissan um støðuna í Grikkalandi og Evru-samstarvinum kann koma at órógva gongdina á fíggjarmarknaðunum munandi. Tískil er sera torført at meta um, hvussu rentan fer at verða ávirkað í 2012.

**Einskiljing**

Tilgongdin at einskilja Lív hevur verið drúgv og knortlut, men arbeitt verður framvegis við at einskilja LÍV. Hetta fer uttan iva at hava ávirkan á virksemi felagsins í 2012.

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri felagið og fyri samtakið fyri 2011. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi og tryggjar, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá móðurfelag og samtaki.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 23. mai 2012

**Stjórn**

Poul Christoffur Thomassen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Finn Danberg<br>nevndarformaður | Gunnleyg Árnafjall<br>næstformaður | Kári Petersen |
| Jógvan Mørkøre | Gunnleivur Dalsgarð | |

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

**Til partaeigararnar í P/F Føroya Lívstrygging**

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Føroya Lívstrygging fyri roknskaparárið 01.01.2011 til 31.12.2011, við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum fyri samtakið og fyri móðurfelagið. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársfrásøgnin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og harumframt eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av samtaksins og felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu pr. 31.12.11 og av úrslitinum av virksemi samtaksins og felagsins í roknskaparárinum 01.01.2011 til 31.12.2011 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

# Átekning frá óheftum grannskoðarum

**Ískoytisupplýsingar viðvíkjandi viðurskiftum í ársfrásøgnini**

Uttan at hetta hevur ávirkað okkara niðurstøðu skulu vit vísa til leiðslufrágreiðingina, brotið um "Serstøk viðurskifti" har leiðslan undir yvirskriftini "Landskassaveðhald" m.a. lýsir, hvussu landskassaveðhaldið er virðisásett, og hvussu hetta ávirkar ársfrásøgnina fyri 2011.

Vit skulu vísa á, at landskassaveðhaldið er veðhald til frama fyri tryggingartakaran í teirri støðu, at P/F Føroya Lívstrygging ikki megnar at halda skyldur sínar. Tað er tí ikki ein framtíðar fíggjarligur fyrimunur fyri felagið, men harafturímóti fyri tryggingartakaran.

Tann nýtti roknskaparhátturin er í trá við lóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð. Tað er okkara áskoðan, at landskassaveðhaldið hevur stóra ávirkan á ársfrásøgnina, og vit eru samdir við frágreiðingina frá leiðsluni hesum viðvíkjandi.

Tórshavn, tann 23. mai 2012

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Hans Laksá
løggildur grannskoðari

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT
Løggilt grannskoðaravirki

Heini Thomsen
løggildur grannskoðari

## ALMENT

Ársfrásøgnin er eins og undanfarna ár gjørd sambært viðtøkum felagsins og í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini og í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir frá Tryggingareftirlitinum. Við nýggju tryggingarlógini frá 2008 vórðu hugtøkini "innrokning" og "máting" tikin í nýtslu. "Innrokning" merkir at taka við í roknskapin og "máting", hvussu virðisásett verður.

### Alment um innrokning og máting í ársfrásøgn felagsins

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar so hvørt, sum tær verða forvunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar, broytingar í avsetingum og broytingar í bonus – so hvørt tær verða staðfestar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virði á ognini verður mett álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tær eru sannlíkar og kunnu mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður fyrilit tikið fyri væntaðum tapi og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Transaktiónir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir moneterir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðir til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

## KONSOLIDERING

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið og dótturfeløgini, P/F Tryggingarfelagið Lív, P/F Royndin, P/F Lutaíbúðarvirkið og P/F Fastogn, hvørs ársfrásagnir eru grundaðar á sama roknskaparhátt, sum tann hjá móðurfelagnum.

Í konsernroknskapinum verða grannskoðaðar ársfrásagnir fyri móðurfelag og dótturfeløg konsolideraðar, og konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, millumverandi, vinningsbýti umframt innanhýsis vinningur og tap av støðisognum verður eliminerað.

## BROYTT INNROKNAN AV LANDSKASSAVEÐHALDIÐ

Tryggingareftirlitið hevur kunngjørt eina broyting til §19a í roknskaparkunngerðini, sum m.a. merkir, at javning av landskassaveðhaldinum nú skal gerast yvir eginognina. Av tí, at øll kundaognin er løgd um til vanligt bonus við gildi frá 1/1 2011, er ikki tørvur á at taka hædd fyri at geva eginogn og kundaogn somu sømdir.

### Ávirkan á rakstrarúrslitið

Hetta er ein grundleggjandi broyting í roknskaparháttinum í mun til undanfarin ár, sum merkir, at alt úrslitið fyri 2011 verður flutt beinleiðis til eginognina.

Í rakstrarroknskapinum eru samanlíkingartølini fyri 2010 broytt, og tað er sett sum fyritreyt, at eingin kundaogn var í 2010. Havast skal í huga, at í 2011 hevur felagið gjørt landskassaveðhaldið upp við støði í sínum individuella fæfeingisstørvi 31/12-2011, eins og individuella fæfeingistørvinum hjá Tryggingarfelagnum Lív. Uppgerðin av landskassaveðhaldinum 31/12-2010 er ikki grundað á individuellan fæfeingistørv, men á aðrar reglur.

Tískil er uppgerðin í 2011 munandi ávirkað av hesum. Ávirkanin av broyttum fæfeingistørvi er henda:

| t.DKK | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Fæfeingistørvur:** | | |
| Føroya Lívstrygging | 542.400 | 82.510 |
| Tryggingarfelagið Lív | 173.400 | 48.094 |
| Tilsamans | 715.800 | 130.604 |
| Broyting í 2011 | 585.196 | |

Sostatt stava slakar 600 mió. kr. av økingini í landskassaveðhaldið frá, at fæfeingistørvurin er broyttur í 2011.

Um roknskaparhátturin ikki varð broyttur, og øll kundaognin ikki varð løgd um til vanligt bonus í 2011, hevði rakstrarroknskapurin fyri 2011 víst fylgjandi upphæddir:

| | | |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld | 89.459 | 92.879 |
| Úrslit av fíggjarvirksemi | 91.630 | 194.319 |
| Javning av veðhaldi | 949.404 | 50.993 |
| Tryggingarveitingar | -96.809 | -93.933 |
| Javning av avsetingum | -457.162 | -185.138 |
| Bonus | -241.932 | -23.437 |
| Rakstrarkostnaðir | -27.861 | -5.269 |
| Aðrir kostnaðir | -1.706 | -748 |
| Úrslit áðrenn skatt | 305.021 | 29.666 |

## Ávirkan á fíggjarstøðu

Samanlíkingartølini í fíggjarstøðuni fyri 2010 eru ikki broytt í sambandi við broyttan roknskaparhátt.

Broytti roknskaparhátturin ávirkar ikki í sær sjálvum aktivini, men broyttu meginreglurnar fyri uppgerð av fæfeingistørvi viðføra, at landskassaveðhaldið er munandi størri, enn tað vildi verið eftir undanfarna roknskaparhátti. Tað fyriliggur ikki nøkur uppgerð av fæfeingistørvinum 31/12-2011 eftir gomlu meginreglunum. Tað fyriliggur heldur ikki nøkur uppgerð av individuella fæfeingistørvi felagsins pr. 31/12-2010, og tískil er ikki møguligt at gera upp, hvussu mikið broyttu meginreglurnar ávirka virðisásetingina av landskassaveðhaldinum pr. 31/12-2011 og úrslitið í 2011.

Um passivini skulu samanberast við 2010, skal kundaognin roknast sum vanligt bonus í 2010, og individuella fæfeingistørvur felagsins skal gerast upp pr. 31/12-2010. Tá hetta ikki er gjørt ber ikki til at gera passivini fyri 2010 upp samsvarandi broytta roknskaparháttinum.

## Ávirkan á 5-ára yvirlit

Í 5-ára yvirlitinum eru úrslitini undanfarin ár ikki broytt. Hetta skyldast, at uppgerðin av fæfeingistørvi undanfarnu árini, sum er sera avgerandi fyri úrslitið, ikki tekur støði í individuellum fæfeingistørvi eins og galdandi er fyri 2011, men byggir á aðrar reglur. Harumframt er rentingin av kundaognin sera týðandi fyri endaligu úrslitini undanfarnu árini, meðan ongin slík renting ger seg galdandi í 2011. Tískil ber ikki til við rímuligari vissu at meta um, hvussu úrslitini vildu verið undanfarnu 5 árini, um sami roknskaparháttur varð nýttur, sum er nýttur fyri 2011.

Hetta ávirkar úrslitið í 5-ára yvirlitinum eins og onkur lyklatøl.

## RAKSTRARÚRSLIT 2011

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2011 eftir hini sonevndu kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í tí. LÍV hevur sambært lóggávuni gjørt ítøkiligar reglur fyri býti av úrsliti, og tær eru fráboðaðar Tryggingareftirlitinum.

Úrslitið fyri 2011 er býtt eftir nevndu meginreglum, sum fyri 2011 merkja, at alt úrslitið verður flutt til eginognina. Vegna rakstrarhall hevur ikki nakað verið at býta til kollektivt bonuspotentiali.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Tryggingargjøld

Tryggingargjøld og innskot verða innroknað í rakstrarroknskapin á skrásettum gjaldkomudegi. Endurtryggjarans partur av tryggingargjøldum verður drigin frá.

**Úrslit av íløguvirksemi**

Inntøkur frá atknýttum og assosieraðum fyritøkum fevna um tann partin av úrslitinum, sum Føroya Lívstrygging eigur.

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og útlánum og vinningsbýti av kapitalpørtum.

Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum og útlánum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**

Innroknað sum tryggingarveitingar verða goldnar veitingar, endurgoldið frá endurtryggingum, broyting í avsetingum til endurgjøld og broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld.

**Bonus**

Broyting í kollektivum bonuspotentiali er tann partur av tí staðfesta rakstrarúrslitinum eftir rentutilskriving v.m., sum verður tilskrivaður ella skuldskrivaður tryggingarmongdini sum óbýtt avseting. Um parturin av staðfestum úrsliti hjá tryggingarmongdini er negativur, fevnir posturin um nýtslu av kollektivum bonuspotentiali, sum er avsett undanfarin ár.

Um samlaða rentan, ið felagið veitir tryggingartakarunum, er størri enn grundarlagsrentan, hevur munurin saman við afturbering av ymsum gjøldum frá 2006 til 2008 verið tilskrivaður sum kundaogn. Frá 2009 verður meirrentan og afturbering av ymsum gjøldum tilskrivað sum bonus í P/F Føroya Lívstrygging, men P/F Tryggingarfelagið Lív tilskrivar framvegis kundaogn.

Broyting í kundaogn fevnir um nettoupphæddina, sum er løgd afturat kundaognini, umframt upphæddina, sum kundaognin er rentað við í árinum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**

Felagið hevur felags fyrisiting við dótturfeløgini (tó ikki P/F Fastogn), og verða kostnaðir býttir millum feløgini sambært avtalum. Eisini umsitur felagið tryggingar fyri aðrar. Hesir kostnaðir fevna um kostnaðir í sambandi við útveganir og fyrisiting av tryggingarmongdini íroknað kostnaðir, ið hava samband við útgjøld av veitingum. Fyrisitingarkostnaðir eru tiknir við sum ein nettoupphædd, har drigin er frá tann parturin, sum er útfaktureraður til onnur.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**

Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Skattur**

Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum postum. Møgulig broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við dótturfeløgini, P/F Tryggingarfelagið Lív og P/F Royndina. P/F Føroya Lívstrygging rindar samanlagda skattin fyri samtakið. Skattaávirkanin av samskattingini verður býtt millum P/F Føroya Lívstrygging og dótturfeløgini í mun til skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtir felagið hitt sonevnda lagurprinsippið, sum m.a. hevur við sær, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Immateriell ogn**

Ritbúnaður umframt onnur immateriell ogn verður innroknað í fíggjarstøðuna til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar og samanløgdu niðurskrivingarnar vegna væntað tap. Møguligt tap verður mett við støði í eini niðurskrivingartest.

**Materiell ogn**

Rakstrargøgn v.m. verða mátað í fíggjarstøðuni til kostprís frádrigið samanløgdu av- og niðurskrivingarnar ella til endurvinningarvirði, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Innbúgv verður avskrivað við eins stórum árligum upphæddum eftir 10 árum. KT-útbúnaður og annar útbúnaður verður avskrivaður yvir 3-10 ár.

Bygningar til egna nýtslu verða mátaðir til endurmett virði svarandi til dagsvirðið á endurmetingardegnum við frádrátti av eftirfylgjandi akkumuleraðum avskrivingum.

Í sambandi við endurmetingar verður hin sonevnda "avkastmannagongdin" sambært roknskaparkunngerðini nýtt. Eftir hesi mannagongd verður støði tikið í rakstraravkasti hjá hvørjum bygningi og einum rentukravi til hvønn bygning.

Bygningarnir eru seinast endurmettir í 2011.

Óbygd grundøki eru mátað til eitt mett dagsvirði.

**Íløguognir**

Íløgubygningar verða virðisásettir til dagsvirði, og virðisjavnan verður gjørd yvir virðisjavningar í rakstrarroknskapinum.

Kapitalpartar í atknýttum og assosieraðum virkjum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við tí lutfalsliga parti av roknskaparliga innara virðinum á virkjunum. Úrslit hjá atknýttum og assosieraðum virkjum verða innroknað í raksturin lutfalsliga eftir teimum pørtum, sum svara til kapitalpartarnar.

Fíggjaramboð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlað fíggjaramboð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Sáttmálavirðið á handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjaramboðum, verður tikið við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjaramboðini.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjaramboðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Ikki børsskrásettir kapitalpartar verða virðisásettir til kostprís við frádrátti av niðurskrivingum.

Útlán verða mátað til amortiseraðan kostprís. Í teimum førum, har tekin eru um virðisminking, eru útlán niðurskrivað við muninum millum bókað virði og nútíðarvirði á væntaðum framtíðar afturgjaldingum, diskonterað við effektivu rentuni í tí einstaka láninum. Slíkar niðurskrivingar verða afturførdar heilt ella partvíst, skuldi virðisminkingin víst seg at verið minni enn upprunaliga mett.

Roknskaparkunngerðin áleggur felagnum at innrokna virðið á landskassaveðhaldi fyri tryggingar, ið eru teknaðar fram til 1/1-2000. Roknskaparliga virðið á landskassaveðhaldinum, er innroknað sum trygd fyri fíggjarligum váðum. Mátað verður til munin millum ognir og skyldur, íroknað krav til kjarnufæfeingi, í partsfíggjarstøðu fyri nevndu tryggingar.

**Áogn**

Dagsvirðið á áogn verður ásett við fyriliti fyri væntaðum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, fevna um goldnar útreiðslur sum viðvíkja næsta roknskaparári umframt tíðaravmarkaðar rentur av fíggjaramboðum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**

Lívstryggingaravsetingar verða mátaðar við at gera upp marknaðarvirðið á væntaðum framtíðar gjaldsstreymum fyri hvørja einstaka trygging. Marknaðarvirðið verður roknað út við at diskontera tær einstøku gjaldingarnar við eini rentu, sum er grundað á ein rentukurvu, sum danska Fíggjareftirlitið hevur almannakunngjørt.

Teir mettu framtíðar gjaldsstreymarnir verða útroknaðir við støði í væntaðari livitíð og avlamnisintensiteti grundað á egnar metingar av felagsins tryggingarmongdum.

Lívstryggingaravsetingar innihalda eitt váðaískoyti, sum hevur fyrilit fyri, at tryggingartakarar væntandi liva alsamt longri. Harumframt verður fyrilit havt fyri sannlíkindum fyri, at tryggingartakarar afturkeypa egnar tryggingar, grundað á greiningar av tryggingarmongdini. Fyri tryggingar, grundaðar á sáttmálar við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, eru hesi sannlíkindi mett til 10%. Fyri aðrar tryggingar eru afturkeypssannlíkindini mett til 100%.

Tryggjaðar veitingar eru marknaðarvirðið á teimum veitingum, sum eru tryggjaðar tí einstaka tryggingartakaranum við einum ískoyti til væntaðan framtíðar kostnað av umsiting og við frádrátti av teimum avtalaðu framtíðar tryggingargjøldunum. Tryggjaðar veitingar fevna um eina metta upphædd til rindan av framtíðar veitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Bonuspotentiali á framtíðar tryggingargjøldum lýsir skyldur til at veita bonus viðvíkjandi avtalaðum tryggingargjøldum, sum ikki eru fallin til gjaldingar enn.

Bonuspotentiali á frítryggingum fevnir um virðið á skyldum til at veita bonus viðvíkjandi longu inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevna um ikki goldnar, men falnar tryggingarveitingar. Í upphæddini er innroknað ein meting av falnum tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

Kollektivt bonuspotentiali er parturin hjá tryggingarmongdini av staðfestum úrslitum, sum eru avsett kollektivt til tryggingar við rætti til bonus, út yvir lívstryggingaravsetingar og avsetingar til endurgjøld.

Kundaogn er ein partur av grundarfæfeinginum á jøvnum føti við eginognina, men við tíðini gerst kundaognin vanligt bonus hjá teimum einstøku tryggingartakarunum, og sostatt er kundaognin fevnd av tryggingarligu avsetingunum.

**Skuld**

Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir á aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og tí skattastigi, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaaktiv, harundir skattavirðið á framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ið aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Aktuellur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**LYKLATØL**

Tey eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30/12-2009 um ársfrásagnir.

Lyklatølini í "avkastskemanum" (sí notu 23) eru roknað soleiðis, at eitt ársavkast er gjørt upp við støði í vigaðari miðalsaldu av íløgum fyri árið.

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | Móðurfelag 2011 DKK | Móðurfelag 2010 t.DKK | Samtak 2011 DKK | Samtak 2010 t.DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tryggingargjøld brutto | 95.269.330 | 99.044 | 362.816.442 | 343.881 |
| | Endurtryggingargjøld | -5.810.550 | -6.164 | -13.042.310 | -13.094 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans** | **89.458.780** | **92.879** | **349.774.132** | **330.786** |
| | Inntøkur frá atknýttum virkjum | -40.338.408 | 49.629 | 0 | 0 |
| | Inntøkur frá assosieraðum virkjum | 21.734 | -262 | 19.944 | -250 |
| | Inntøkur frá íløgubygningum | | | 27.254.784 | 28.018 |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 67.875.064 | 62.989 | 109.541.646 | 94.393 |
| 3 | Virðisjavningar | 67.123.761 | 85.092 | 66.801.247 | 115.582 |
| | Rentuútreiðslur | 0 | 0 | -19.356.479 | -19.696 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -3.052.070 | -3.129 | -6.803.289 | -6.173 |
| 4 | Kostnaðir knýttir at íløgubygningum | 0 | 0 | -3.052.647 | -4.078 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi tilsamans** | **91.630.081** | **194.319** | **174.405.206** | **207.795** |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -100.188.696 | -93.959 | -189.687.189 | -190.989 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingum | 476.293 | 26 | 1.411.402 | 2.091 |
